## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og eitt skifti regn, seinni snarar hann í útsynning og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið ælingur. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, mikudagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

Summarfestivalurin:

# Verður útseldur í forsølu

**Forsølan til Summar Festivalin hevur gingið óvanliga væl, og heili 4000 atgongumerki eru longu seld**

TÍÐINDASKRIV

Bara 1000 atgongumerki afturat verða seld í forsølu til Summar Festivalin

Sølan av atgongumerkjum til festivalin gongur støðugt, og fyrireikararnir meta tað vera sannlíkt, at festivalurin verður útseldur í forsølu.

Fyrireikararnir hava sett hámark fyri, hvussu nógv fólk sleppa inn til festivalin, og tað markið er sett til 5000 fólk hvønn dagin. Hetta verður gjørt, so at allir gestirnir kunnu fáa eitt gott upplivilsi á festivalinum. Hugsað verður um trygd, tænastur, matsølu og ferðing til og frá festivalinum.

Orsøkin til stóru forsøluna, sum helst er tann størsta til nakað tónleikatiltak í Føroyum nakrantíð, er, at Summar Festivalurin hevur fingið kend nøvn sum Brian McFadden, Shakin' Stevens og Anne Linnet at spæla, umframt nógv góð føroysk nøvn. Og tað er ikki minst poppstjørnan, Brian McFadden, sum dregur nógv fólk til festivalin.

Harafturat eydnaðist festivalurin í fjør væl. Tað er eisini ein týðandi orsøk til stóra áhugan í ár.



*Fyrireikararnir av Summar Festivalinum hittu Brian McFadden á Nibe Festivalinum fyri góðari viku síðani. Steintór Rasmussen bjóðaði McFadden vælkomnum til Klaksvíkar, og írska poppstjørnan segði seg gleða seg til Føroyaferðina*

### Fleiri avdúkingar

Fyrireikingarnar til Summar Festivalin ganga væl. Allir bólkarnir eru komnir upp á pláss, og allar aðrar praktiskar fyrireikingar ganga eisini væl.

Summar Festivalurin verður hildin fríggjadagin 5. og leygardagin 6. august. Fyrireikararnir siga, at í næstu viku verða helst onkrar spennandi avdúkingar afturat um Summar Festivalin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 15 |
| Tromsø | 21 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 16 |
| New York | 22 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og grynnist. Ein hitabrúgv við Føroyar fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Hvarvið grynnist. Lágtrýstið á 52N-28V fer spakuliga í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður væntandi við Føroyar sunnudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/7 kl. 06[00]– 8/7. 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 7/7 kl. 06[00]– 8/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 25,7 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

5. juli — Jørðin longst frá sólini
6. juli — Tendring
8. juli — Mánin longst frá jørðini
14. juli — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. Juli | 09.49 | 22.09 | 08.49 | 21.09 | 09.04 | 21.24 | 11.49 | - | 00.30 | 12.49 | 08.04 | 20.24 | 07.04 | 19.24 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 09.34 | 21.54 | 10.49 | 23.09 |
| 10. Juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | - | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |
| 11. Juli | 11.03 | 23.20 | 10.03 | 22.20 | 10.18 | 22.35 | 00.46 | 13.03 | 01.46 | 14.03 | 09.18 | 21.35 | 08.18 | 20.35 | 11.18 | 23.35 | 00.01 | 12.18 | 10.48 | 23.05 | - | 12.03 |
| 12. Juli | 11.37 | 23.55 | 10.37 | 22.55 | 10.52 | 23.10 | 01.20 | 13.37 | 02.20 | 14.37 | 09.52 | 22.20 | 08.52 | 21.20 | 11.52 | - | 00.35 | 12.52 | 11.22 | 23.40 | 00.20 | 12.37 |
| 13. Juli | 11.55 | - | 10.55 | 23.32 | 11.10 | 23.47 | 01.55 | 13.55 | 02.55 | 14.55 | 10.10 | 22.47 | 09.10 | 21.47 | 00.20 | 12.10 | 01.20 | 13.10 | 11.40 | - | 00.55 | 12.55 |

5 707265 100067 >